LM-068/2022

umhvørvisstovan

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
GONGIN 7
POSTBOX 377
110 TÓRSHAVN

Argir hin 6. september 2021
Málsnr.: 21/00806-2
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni til uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd og uppskot til broytingar í løgtingslóg um náttúrufriðing

Umhvørvisstovan hevur fingið uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd og uppskot til broytingar í løgtingslóg um náttúrufriðing til hoyringar.

1. Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd

Umhvørvisstovan tekur undir við, at nýggj náttúruverndarlóg loksins er orðað og vónandi verður samtykt í næstum, tí tørvur hevur í fleiri ár verið á eini nútímans náttúruverndarlóg. Tó harmast Umhvørvisstovan um, at ein tann týdningarmesta ásetingin, sum var í uppskotinum til náttúrumargfeldislóg frá mars 2019, er tikin úr uppskotinum. Tað er ásetingin um, at allir almennir myndugleikar skulu taka atlit at náttúruni sum grundarlag og meginreglu, tá avgerðir verða tiknar.

Meginreglan um, at at atlit at náttúru og umhvørvi skal vera ein integreraður partur av øllum avgerðum hjá almennum myndugleikum er m.a. ásett í grein 6 í altjóða sáttmálanim um lívmargfeldi, sum Føroyar hava tikið undir við. Í uppskoti til yvirlýsing frá seinkaða lívmargfeldistoppfundinum í Kunming í Kina seinni í ár og komandi ár, eru 13 mál, sum arbeiðast skal við fyri at steðga afturgongdini í livmargfeldinum. Eitt av hesum er, at haldast skal fram við arbeiðinum fyri at tryggja, at lívmargfeldið verður ein óloysandi partur í politikki, reglum, planlegging og avgerðum.

Eisini harmast Umhvørvisstovan um, at ásetingin um, at øll veiða skal vera burðardygg, er tikin úr uppskotinum. Tað, at øll veiða og tøka av dýrum og plantum er burðardygg, eigur at vera ein grundleggjandi partur av náttúruverndini.

Í lógaruppskotinum eru ásetingar um veiðu og tøku av plantum og dýrum, men eingin áseting um at taka m.a. grót og tinnur. Fært hevur verið fram, at fólk hava tikið eitt nú tinnur í náttúruni, og flutt tær av landinum. Mælt verður til at seta eina áseting um bann fyri at taka tinnur o.a. í náttúruni í lógaruppskotið ella at heimila landsstýrismanninum í kunngerð at gera reglur um hetta.

Ásetingarnar um ílegutilfar, sum var í upprunaliga uppskotinum til nátturumargfeldislóg eru tiknar úr uppskotinum. Umhvørvisstovan mælir til, at ásetingarnar verða settar inn í lógaruppskotið.

LM-068/2022

Umframt viðmerkingarnar omanfyri hevur Umhvørvisstovan hesar ítøkiligu viðmerkingar til lógaruppskotið:

§ 7, stk. 1: Ásett er, at landsstýrismaðurin kann loyva tøku av villum súgdýrum og fugli.
Umhvørvisstovan heldur, at ásetingin eisini eigur at fevna um onnur dýr so sum froskar, sum eru sleptir út í náttúruna, og siggja út til at kunna nørast. Vit vita ikki, hvørjar avleiðingar tað kann hava fyri lívmargfeldið, um eitt nú froskar fara at nørast í føroysku náttúruni. Talan kann ivaleyst eisini vera um onnur dýr, sum kunnu vera til skaða fyri lívmargfeldið.
Mælt verður til, at § 7, stk. 1, 1 punktum verður orðað soleiðis:
Landsstýrismaðurin kann við kunngerð ella fyrisitingaravgerð loyva tøku av villum súgdýrum, paddum, fugli, o.o.

§ 15, stk. 1, nr. 2 Mælt verður til, at § 15, stk. 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:
vill súgdýr, paddur og fugl av slogum, undirslogum ella stovnum, sum ikki frammanundan finnast natúrliga í einum oki.

2. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing

Umhvørvisstovan hevur ongar yvirskipaðar viðmerkingar broytingar í fyrsta og øðrum parti av lógini. Tó eru nakrar ítøkiligar viðmerkingar til einstakar ásetingar.

Umhvørvisstovan mælir til, at friðingarnevndirnar verða avtiknar, og at lógin verður løgd til ein fyrisitingarstovn við neyðugum fakligum førleikunum at fyrisita.

Umhvørvisstovan hevur hesar ítøkiligu viðmerkingar:

§ 2, stk. 6 Viðarlundanevndin eigur at vera Skógfriðingarnevndin.

§ 4, stk. 2, "Sermerkt landslag" er broytt til: "sereyðkenni við landslagnum". Sama vending í §3, stk. 2 er ikki broytt.

§ 13 stk. 2 Føroya Jarðarráð er broytt til Búnaðarstovan. Hetta er ikki gjørt í § 21, stk. 1.

Vinarliga

Suni Petersen, deildarleiðari